gult18 cyan18 magenta18 svart18



# Nógv er á skránni

**Hóast FM-kappingin í bridge nú er av, eru ikki stundir hjá føroyskum leikarum at taka sær av løttum fram til komandi heyst**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*



Komandi leygardag verður tann sera væl umtókta parakappingin í bridge leikt í Kagganum í Tórshavn. Kappingin er vorðin ein tann best umtókta parakappingin, vit hava her heima. Sum nakað nýtt verður byrjað við, at tey bæði liðini, sum vunnu hvør sítt umfar í liðkappingini hjá BK 2000/2001 leika ein dyst á 8 spøl fyri at finna ein samlaðan vinnara.

Liðini: í kappingini eru hesi:

Bogi Simonsen, Niels Nielsen, Finn Ougaard og Høgni Jacobsen.

Per Kallsberg, Dánjal Pauli Mohr, Marjun Restorff og Arnleyg Mikkelsen.

Lagt verður til brots klokkan 13:00 við liðfinaluni. Sjálv parakappingin byrjar kl 14:00. Av tí at pláss ikki er fyri meir enn 10 borðum, verður luttøkan avmarkað. Kappingin verður fyriskipað av Róa á Røgvu Joensen, ið hevur staðið á odda fyri fleiri av teimum best fyriskipaðu kappinginum hetta kappingarárið.

## Unglinga NM í summar

Unglingalandsliðið hjá okkum skal til Trelleborg í Svøríki síðst í juni at spæla norðurlandakapping. Vit fara her í blaðnum at presentera unglingalandsliðið ein og ein. Á liðnum verða Arne Mikkelsen, Reimund Langgaard, Gunnar Mouritsen, Høgni Vesturklett, Pól Egholm og Magni Jøkladal. Ferðaleiðari og NPC verður Finn Ougaard.

Leikarin hesu ferð er:
Navn: Gunnar Mouritsen
Føddur: 18. september 1982
Bústaður: Tórshavn

Gunnar Mouritsen má sigast at vera ein av okkara evnaríku bridgespælarum. Hann byrjaði at spæla bridge í 1995. Hann hevur einaferð áður royndt seg í NM høpi, tað var í 1997, tá ið NM varð leikt í Føroyum. Gunnar hevur hetta síðsta árið leikt í 1.deild, har hann og makkarin stóðu seg væl. Gunnar gongur í 2. g í Hoydølum.

## Opið hús

Unglingalandsliðið, sum fer til NM í Svøríki í summar, skipar fyri almennum parakappingum í Bridgehúsinum í Havn hvønn sunnudag, til teir fara avstað umleið 20. Juni. Longu nú sunnudagin hava teir opið hús kl 14.00. Spæligjaldið fer til fígging av ferðini hjá teimum, so teir vóna góða undirtøku.

## Rottneros

Tað er komandi vikuskifti, at norðurlendska kappingin fyri steypavinnarar verður spæld í Rottneros í Svøríki. Føroyska liðið, sum vann steypakappingina her heima, er við í kappingini. Við á liðnum eru Simin Lassaberg, Árant Berjastein, Marner Joensen og Árni Dam. Kappingin hevur sína egnu heimasíðu, har vit kunnu fylgja við gongdini. Heimasíðan hjá Havnar Bridgefelag (www.bridge.fo) hevur lagt slóð til hesa heimasíðuna.

## World Wide Simultan

Hendan kappingin, har leikarar um allan heimin leika somu kortgevingar, verður spæld 1. og 2. juni. Í Føroyum verður spælt fríggjakvøldið 1. juni kl. 19.00 í Bridgehúsinum í Havn. Havnar Bridgefelag og Nýggja Bridgefelag skipa fyri kappingini.



*Gunnar Mouritsen er ein av evnaríku unglingunum, sum í summar skal til Svøríkis at royna seg í unglinga-NM*

Kappingarleiðarar verða Oddmar Danielsen og Arnbjørn Sivertsen, og fólk kunnu melda seg til kappingina hjá øðrum teirra.

## Umboðsfundurin hjá FBS

Á umboðsfundinum hjá FBS var eingin nýggj nevnd vald. Eingin hevði nakað uppskot til nevndarlim. Eyka umboðsfundur er settur at verða í august, og tá skulu tveir nýggir nevndarlimir veljast. Gamla nevndin verður sitandi til eykafundurin hevur verið.

Uppskot varð lagt fram á umboðsfundinum um at seta ein "løntan" skrivara í FBS at taka sær av m.a. at samskipa kappingar hjá FBS og at skipa fyri frálæru í bridge. Fólk vístu hesum uppskoti stóran áhuga. Uppskotið verður lagt fram til samtyktar á eyka umboðsfundinum í august. Verður tað samtykt, merkir hetta helst stórar broytingar fyri bridge í Føroyum, vónandi til tað betra.

## Dupult skvisur

Vit skulu eisini hava eitt spæl við hesu ferð. Spælið er frá EM kappingini fyri pør í Italia fyrr í vár.

| | | |
|---|---|---|
| | Norður | |
| | Q104 | |
| | 1063 | |
| | J10652 | |
| | Q8 | |
| Vestur | | Eystur |
| A985 | | 3 |
| A94 | | K82 |
| AK73 | | Q98 |
| 62 | | AKJ754 |
| | Suður | |
| | KJ762 | |
| | QJ75 | |
| | 4 | |
| | 1093 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | - | - | pass |
| 1ut | pass | 2sp | pass |
| 3kl | pass | 3sp | D |
| 4kl | pass | 5kl | pass |
| 6kl | pass | pass | pass |

Meldingarnar kunnu tykjast eitt sindur løgnar. 2sp er flytimeld (transfer) til kleyvara, og tit koma í ein góðan slemm.

## Hvussu spælir tú?

Leif Trapp spældi hetta sera væl. Spaðari kom út til essið, og hann trumfaði ein spaðara. Hann tók síðan klA, spældi rútara til essið og kleyvara móti borðinum. Tá klQ fall, tók hann eisini tann síðsta trumfin. Kontraktin var heima, men hvat við einum yvirstikki?

Trapp tók rúQ, spældi rútara til kongin, trumfaði ein spaðara, og støðan var nú hendan:

| | | |
|---|---|---|
| | - | |
| | 1063 | |
| | J | |
| | - | |
| 9 | - | |
| A9 | | K82 |
| 7 | - | |
| • | | 5 |
| K | | |
| | QJ7 | |
| | - | |
| | - | |

Kl 5 skvisaði nú Sunnan í major, og tá hann kastaði hjartara, kundi Trapp kasta sp9. Men hetta var bara tann fyrri skvisurin, tí hvat skuldi Norðan kasta? Hann mátti goyma rúJ, og so stóð allur hjartarin á borðinum.

# Nýtt Fair-Play flagg

**Aftur í ár ber til hjá fótbóltsfeløgum at fáa pening, um leikarar teirra skikka sær nóg væl**

FAIR PLAY
*Jákup Mørk*

Tryggingarfelagið Føroyar hevur sent út tíðindaskriv viðvíkjandi sonevndu Fair-Play skipanina, sum Tryggingarfelagið og Fótbóltssambandið hava samstarvað um síðani 1993.

Hetta er ein skipan, har lið úr úr trimum teimum ovastu mansdeildunum kappast um Fair-Play steypin. Tó so, at felag, ið hevur lið í fleiri av nevndu deildum, bert kann luttaka við besta liðnum.

## Reglurnar

Tá landskappingini byrjar, verða 20.000 krónur settar av til hvørt liðið. Liðini verða síðani sektað fyri reyðu og gulu kortini, sum tey fáa í árinum. Gul kort kosta 1.000 kr. fyri hvørt, meðan reyðu kortini verða revsað við 3.000 kr. Hesar upphæddir verða so drignar frá teimum upprunaligu 20.000 kr., so hvørt sum árið líður.

Tað liðið, sum hevur størstu upphæddina eftir av avsettu upphæddini, tá kappingarárið er liðugt, fær ikki bert peningin, ið er eftir, útgoldnan, men fær samstundis heitið sum Leikumfagurt, Fair-Play, meistari.

Kappast hevur verið um steypið frá 1993, og gongur avtalan millum partarnar fram til og við 2002. Steypið verður latið tí felag, sum hevur vunnið flestu ferðir hesi árini, og fer handanin av hesum fram á aðalfundinum hjá FSF.

Sjálvar reglurnar fyri kappingina eru ásettar av Tryggingarfelagnum og FSF, og hava partarnir í ár latið nýtt Fair-Play flagg gjørt. Hetta flagg verður nú sent feløgunum kring landið, og verður hetta sostatt at síggja til fótbóltsdystir kring alt landið í ár.

*Petur Elias Petersen og Heðin Mortensen frá Tryggingarfelagnum Føroyar, Ísak Mikladal og Tórleif Sigurdsson frá FSF*




gult19 cyan19 magenta19 svart19




## Útbjóðing

Í samband við at umbygging og ábøtir skulu gerast á **Svimjihøllina í Klaksvík**, verður 1. byggistig við hesum vegna Klaksvíkar Kommunu, boðið út alment í høvuðsarbeiðstøku.

**Arbeiðið fevnir um:**
Niðurtøku av torn- og takkonstruktión, veitan og uppsetan av nýggjari takkonstruktion úr stáli og límtræi. Eisini verða nýggj vindeygu og úthang uppsett.

Niðurrívingar arbeiði
Timburarbeiði
Snikkaraarbeiði
Stálarbeiði
Málaraarbeiði

Boðini skulu latast inn í afturlatnum brævbjála, merktur:

**Umbygging og ábøtur á Svimjihøllina 1. Byggistig.**

Boðini verða latin upp mánadagin 6. juni kl. 15.00 í býráðshøllini hjá Klaksvíkar Kommunu, og kunnu teir bjoðandi verða hjástaddir.

Áhugaði kunnu bíleggja útbjóðingartilfar frá:

**Preben Hansen, ráðgevandi verkfrøðingur**

Áðrenn mánadagin 14. mai kl. 12.00.

Projektleiðsla og konstruktiónsverkfrøði
**Preben Hansen, ráðgevandi verkfrøðingur**
Argjaboðagøta 7
FO-160 Argir
tlf 312025, fax 310087,
e-mail phansen@post.olivant.fo

Arkitektarbeiði
**Fuglø Arkitektar**
Gerðagøta 12, FO-700 Klaksvík
tlf 457887, fax 457897,
e-mail fugl-ark@post.olivant.fo

## Almanna- og heilsuútbúgvingin í Suðuroy

## Lærarastørv

Á Almanna- og heilsuútbúgvingini á Tvøroyri eru 2 størv leys til setan 1. juli og 1. august 2001 ella eftir avtalu. Størvini eru á 3/4 tíð (setanarbrøkurin er 0,75).

Uppgávan hjá lærarunum verður:
- Saman við deildarleiðaranum at gera útbúgvingar- og undirvísingarætlanir fyri útbúgvingarnar og skipa fyri undirvísingini
- undirvísa á útbúgvingunum.

Ynskiligt er at umsøkjararnir
- eru førir fyri at undirvísa í heilsu- og røktarfakum
- hava eina miðallanga framhaldsútbúgving sum til dømis sjúkrasystur, fysioterapeutur, ergoterapeutur ella líknandi
- hava víðariútbúgving innan pedagogik t.d. á diplomstøði
- starvsroyndir innan almanna-/heilsuøkið
- hava góð samstarvsevni

Talan er um spennandi størv, har møguleiki er fyri nýhugsan og nýskapan, nú útbúgvingarnar eru nýggjar.

Sáttmála- og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Susanne Høgh Olesen, deildarleiðara, telefon nr. 372855.

Umsókn saman við CV og útbúgvingarskjølum verður at senda til:

**Sjúkrasystraskúla Føroya**
Rektaran
Eirargarður 14
100 Tórshavn

í seinasta lagi 25. mai 2001.

## Plantið eitt træ 2001

**Aftur í ár letur kommunan 500 plantupakkar. Í hvørjum pakka eru 4 ymisk trø av niðanfyrinevndu sløgum, og er ein pakki til hvørt húski.**

**Plantusløgini eru:**
**Sitkaelri** (Alaskael) Alnus sinuata, harðbalið skjóttvaksandi leyvtræ, verður miðal stórt.

**Fjalla Gullregn**, Laburnum alpinum, harðbalið leyvtræ, verður miðal stórt/breiðvaksið, fær gular blómur um miðsummarið.

**Kontortafura**, Pinus contorta, breiðvaksið veturgrønt nálatræ, við longum nálum, helst tað harðbalnasta nálatræið hjá okkum. Tolir alla jørð, bert ikki ov vátt.

**Volgesu Rønn**, Sorbus mougeotti, harðbalið miðalstórt leyvfallandi træ ella stórur runnur, blómar væl og fær reyð ber um heystið.

Útflýggingarseðlarnir verða útflýggaðir í býráðssalinum,

**leygardagin tann 12. mai 2001**
**millum kl. 14.00 og 16.00**

Plantupakkarnir verða sum vanligt heintaðir hjá:

**Skógrøkt landsins, Hvítanesvegur, Hoyvík.**

**mánadagin tann 14. mai 2001**
**millum kl. 9.00 - 18.00.**

*Tórshavnar kommuna*



## Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2001-2002 verða biðin um at senda mentamálanevndini umsókn í seinasta lagi mikudagin 23. mai 2001.

Fuglafjørður, tann 07. mai 2001

**Fuglafjarðar býráð**
**Mentamálanevndin**

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10 c, Tórshavn

**leygardagin 26. mai 2001 kl. 14.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

**Spastikarafelagið**

**Søkt verður eftir**

## Fólki

til handil okkara í Saltangará at byrja eftir nærri avtalu.

Persónslýsing:
- Er fyrikomandi
- Er kundavinarligur
- Er ágrýtin
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men er hetta eingin treyt.

Hevur hetta tín áhuga, so skriva ella ring til okkum skjótast tilber.

**KIOSK VÁR**
600 Saltangará
tlf. 448392 millum kl. 9-10

Demich



Søkt verður eftir dugnaligum rør-, blikk-, maskinella kleinsmiðjum at byrja skjótast tilber.

**Demich**
**Tlf. 311071**

## Skúlastýrisvalið til Sandoyar Meginskúla

Vallistin til skúlastýrisvalið 28. mai liggur frammi á somu støðum, sum listarnir til valið til bygdaskúlarnar.

Fólk, sum ikki eru á vallistanum og sum hava valrætt og valbæri, skulu gera vart við seg í seinasta lagi 21. mai við undirskrivaðari váttan.

**Valnevndin**